# Nýggj salong við øðrvísi tilboðum

**Fýra frisørdamur úr Havnini fara komandi mánadag at lata upp eina nýggja salong í Havnini. Umframt at hava vanligu frisørtænastunar, verða eisini øðrvísið tilboð á skránni**

UPPLATING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Tað eru tær fýra Mena Joensen, Annika Hvidtfeldt, Annika Udbø og Susi Jensen, ið fara at reka salong Madonnu í miðbýnum í Havn. Salongin letur upp mánadagin 6. september*

Tær eita Mena Joensen, Annika Hvidtfeldt, Annika Udbø og Susi Jensen, og eru allar kendar hárfríðkanardamur í Havnini. Nú vilja tær royna seg við egnari salong, og tær lata upp mánadagin 6. september.

– Vit hava tosað um hetta nógvar ferðir fyrr, men tað er ongantíð blivið til nakað. Nú var møguleikin her, og so tóku vit av, sigur Annika Hvidtfeldt.

Tær fýra fara at arbeiða sjálvstøðugt við hvør sínum stóli í salongini.

– Vit eru allar ógvuliga ymiskar, so tú kanst faktiskt fáa allar stílir her. Annika Hvidtfeldt er rættiliga flipput í sínum klippistíli, meðan eg til dømis eri perfektionist, greiðir Mena frá.

## Aðrar tænastur

Sum nakað nýtt fara tær at hava ymisk onnur tilboð í salongini eisini.

– Inga, sum er døgverðakokkur á Pizza 67, er eisini útbúgvin massør. Hon fer at vera her einar tveir dagar um vikuna, ella eftir tørvi, og geva massagu. Tær fyrstu fýra tíðirnar hjá henni eru longu bookaðar, tí vit fýra hava longu bílagt okkum hvør sína tíð, sigur Mena flennandi.

Einar tvær ferðir um vikuna fer ein myrk dama eisini at vera í salongini. Hon fer at seta hár uppí, flætta, gera rasta hár og so framvegis.

– Tað verður sum við massaguni, at tú kemur inn og bíleggur eina tíð. So koma tær eftir tørvi, sigur Mena.

Men tað, sum tey flestu munnu gleðast mest um at hoyra, er, at tær ætla sær at hava sera bíligar prísir.

– Vit fara ikki at vera ein discount salong, men ein salong við góðari tænastu, høgum støði og bíligari prísum. Og vit fara allar at hava somu prísir, hóast vit arbeiða sjálvstøðugt, greiðir Mena frá.

Men tær fýra á Salong Madonnu hava fleiri góð kort á hondini. Uppá longri sigt, hava tær góðar møguleikar at víðka um virksemið.
Millum annað hevur Annika Hvidtfeldt hevur verið í Danmark á kosmetikskúla og útbúgvið seg til at geva varandi sminku. Tá verða t.d. eygnabrýr og varrar málaðar við varandi liting.
Eisini duga báðar Annikur'nar og Mena at pierca, og sum frá líður ætlar tær sær møguliga at veita hesa tænastuna eisini.

Men í byrjanini verður denturin bert lagdur á vanliga hárfríðkan, massagu og uppísetan av hári.

## Salong Madonna

Salongin er í miðbýnum, við síðuna av Keypsamtøkuni og yvirav Fótbúna, har handilin Events fyrr helt til.

– Vit sluppu inn í hølini fyri einum trimum vikum síðani, og vit hava allar arbeitt sum svakar, fyri at fáa alt klárt til tíðina. Bæði familja og vinfólk hava verið og hjálpt okkum, og uttan tey hevði tað nokk ikki gingið at latið upp nú mánadagin, sigur Annika Hvidtfeldt.

Mena leggur afturat, at tað hava verið nógvir langir dagar, har tær hava málað og manererað, fyri at fáa alt upp á pláss.

Men nú byrjar at líkjast. Hølini eru sera hugnalig, alt er málað við ráhvítum, og Mena leggur dent á, at soleiðis vildu tær eisini hava tað.

– Fólk skulu kenna seg væl, tá tey koma inn, og tí hava vit valt at innrætta salongina so hon minnir mest um eina stovu. Vit vildu ikki hava hetta sterila, salong-aktiga, sigur hon.

Fyri fyrst verða bert hølini í gøtuhæddini nýtt til salongina. Loftið er til tær fýra at hvíla seg í, og Ingu at massera í. Men kanska tær, sum frá líður, fara at víðka um tænasturnar, og fara at taka loftið upp í salongina eisini.

– Nú skulu vit fyrst lata upp, so fáa vit at síggja hvussu tað fer at verða. Vit hava tosað um nógv ting, sum man kundi gjørt, men teimum bíða vit við, sigur Mena at enda.

Salong Madonna letur sum sagt upp mánadagin, og tær siga, at tað verður við onkrum góðum upplatingartilboðum.

# Strúkarar í heimsflokki

**Tveir brøður úr Ungarn eru í hesum døgum í Føroyum og leggja føroyskum strúkarum lag á**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*



*Csaba Szilvay leggur einum næmingi lag á. Úrslitið av undirvísingini kann upplivast í Kommunuskúlanum leygardagin klokkan 16*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Føroyskir strúkarar hava í hesum døgum møguleika at nema sær kunnleika frá tveimum meistarum. Tað eru brøðurnir Géza og Csaba Szilvay, sum vitja í Føroyum og hava skeið fyri føroyskum strúkarum.

Teir báðir eru upprunaliga ættaðir úr Ungarn, men hava sítt dagliga virki í Finnlandi, har teir hava ein skúla fyri strúkarar. Hesin skúlin er navnframur um allan heim innan tónleikaumhvørvið, har nógvir sera dugnaligir strúkarar hava gingið.

## Kollvelt tónleikalívið í Finnlandi

– Hesir báðir tónleika-úrmælingarnir hava kollvelt finskt tónleikalív, og nógvir sera dugnaligir strúkarar hava nomið sær útbúgving á júst hesum skúlanum, sigur Ólavur Hátún, sum í samstarvi við Tórshavnar Musikkskúlanum og Føroya Musikklærarafelag hevur tikið stig til vitjanina hjá teimum báðum ungarunum.

Talan er tískil um ein skúla á altjóða støði, sum ungarsku brøðurnir settu á stovn í 1972, og fleiri úrmælingar hava fingið undirvísing á júst hesum skúlanum.

Tað sermerkta við hesum skúlanum er undirvísingarhátturin, sum teir báðir brøðurnir sjálvir hava ment ígjøgnum drúgvar royndir við strúkara-næmingum. Hesin sonevndi colourstrings læruhátturin, sum hevur eina serliga nóta- og hoyrilæru, hevur gjørt skúlan kendan og virdan um allan heim.

Við sær í Føroyum hava teir tríggjar 12-ára gamlar gentur, ið skulu vera við í undirvísingini á Frúutrøð.

## Konsert

Undirvísingin fer soleiðis fram, at um dagin eru tað teir ungu næmingarnir, ið fáa undirvísing, men um kvøldið eru tað okkara bestu næmingar og lærarar á Musikkskúlanum, ið fáa lærdóm frá brøðrunum úr Ungarn.

Leygardagin klokkan 16 verður konsert í Kommunuskúlanum í Havn, har føroyskir strúkarar fara at luttaka saman við teimum báðum undirvísarunum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Csaba og Gésa eru í Føroyum. Í 1986 vitjaðu teir her og høvdu skeið og konsert, men síðani hava teir ikki vitjað aftur í Føroyum.

Tveir føroyingar fara í næstum yvir til Finnlands at fáa undirvísing á skúlanum hjá teimum báðum. Talan er um Tórð Restorff og Angelika Nielsen, sum fáa møguleika at fara á eitt skeið í tríggjar mánaðir.

Vikuskifti

Nr. 168 • leygardagur • 4. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

I AM:
Ímillum skøkjur og ólavsøkugestir
síða 4–5





*Mikkjal og Joan eru trý ára gomul. Teimum dámar avbera væl at ganga í dagrøkt, og tey spældu so fitt í góðveðrinum hendan dagin*

# Aftur til gerandisdagin

**Summarfrítíðin er av, og hóast summarveðrið enn er av tí besta, so eru skúlar, barnagarðar og so framvegis byrjað aftur. Á Viðareiði eru tað tríggjar vikur síðani børnini í dagrøktini byrjaðu aftur, og lagið var avbera gott ein dagin í vikuni, tá Sosialurin kom framvið**

SUMMAR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Viðareiði:**

Spælistovan liggur miðskeiðis í bygdini, tætt við skúlan. Nógv børn eru at síggja har um leiðir, og tey hugna sær í góða veðrinum. Børnini eru í øllum aldri. Summi súkkla, summi renna bara runt, meðan upp aftur onnur spæla við sand.

Hallur, Petur og Anna sita og grava í sandinum.

*Hvat gera tit?*

– Onki, svarar Anna stutt aftur.

Tey halda tað er eitt sindur flovisligt, at ókunnugt fólk bara soleiðis kemur at tosa við tey. Men tað gongur tó skjótt yvir, og tá tosið fellur inn á, hvar tey hava verið og ferðast í summarfrítíðini, er Petur sera tíðindafróður.

– Eg havi verið í Danmark, Signabø og í Suðuroy, sigur hann. Anna sigur, at hon eisini hevur verið tað, meðan Hallur greiðir frá, at hann hevur verið tvær ferðir í Nesvík.

Øll trý halda tað vera óføra stuttligt at vera í Nesvík, og fara tey heilt víst aftur, siga tey.

## Føðingardagar

Hesi trý børnini njóta at spæla úti í sólini, men tá tey verða spurd, um tey gleða seg til veturin, svara tey játtandi beinanvegin.

– Tá kemur kavin, og tað er ordiliga skek, heldur Petur fyri, meðan hann grevur við einum gulum spaka langt niður í sandin.

Anna og Hallur nikka somuleiðis. Tey fortelja, at tey eru øll fimm ár, so nú eru tey ikki lítil longur. Ímeðan koma tvey onnur børn afturat. Joan og Mikkjal.

– Veitst tú, hvør fer at fylla í morgin, tá tað er januar, spyr Mikkjal, meðan hann hyggur við stórum spyrjandi eygum.

Tá svarið er noktandi, svarar hann, at hann fer at fylla fýra, meðan hann vísir fýra fingrar fram.

Joan er skjót at siga, at hon eisini er trý ár. Og so vísir hon øllum, at hon dugir at bólta rút.

Sum hjá øllum børnum er føðingardagurin hjá teimum altíð spennandi, og tað lýsir úr eygunum á teimum, at tey gleða seg. Líkamikið hvussu langt frammi í tíðini stóri dagurin liggur.

## Bjørt framtíð

Tríggir dagrøktarar eru í spælistovuni hendan dagin. Tað eru annars seks dagrøktarar á Viðareiði, og tær skiftast um at vera í spælistovuni. Aðruhvørja viku tveir dagar og tríggjar dagar.

25 børn eru í skipanini. Tey kunnu vera í aldrinum frá 0 upp til 3. flokk. Sum er er bert tað eina skúlabarni. Ein drongur, sum júst er farin í 1. flokk. Tað kann vera nakað langligt hjá honum at vera einasti, sum er so stórur, men hann hevur funnið útav, at hann sleppur nøkur ting, sum hini í flokkinum ikki sleppa, tí tey ikki eru í skipanini. So tað er ikki so galið kortini.

Dagrøktin hevur havt frí í fýra vikur í summar, og hon byrjaði aftur sama dag sum skúlarnir.

Heili átta børn fóru úr skipanini í skúla í ár, og tey børnini sum eru fimm ár í dag eru níggju í tali. So ikki kann annað sigast, enn at framtíðin fyri skúlanum á Viðareiði sær bjørt út.